Sameindu tjóðir

# Sáttmáli um rættindi teirra, ið bera brek

Nevnd, sum kannar rættindi teirra, ið bera brek.

Endaligar viðmerkingar til fyrstu frágreiðingina úr Danmark*

## I. Inngangur

1. Nevndin viðgjørdi ta fyrstu frágreiðingina úr Danmark (CRPD/C/DNK/1) á 155. og 156. fundi, sum hildnir vóru 23. og 24. septembur 2014, og samtykti hesar endaligu viðmerkingar á 169. fundi, sum hildin varð 2. oktobur 2014.

2. Nevndin fegnast um fyrstu frágreiðingina úr Danmark, sum fevnir um upplýsingar um Danmark og sálvstýrandi økini í kongsríkinum, nevniliga Føroyar og Grønland, sum var gjørd í samsvari við leiðreglur nevndarinnar um frágreiðingar, og takkar sáttmálaparti ríkisins fyri skrivligu svarini (CRPD/C/DNK/Q/1/Add.1) til listan yvir mál, sum nevndin hevði fyrireikað.

3. Nevndin virðismetir ta gevandi samrøðuna, sum var hildin við sendinevnd sáttmálapart ríkisins, meðan frágreiðingin varð skrivað, og rósar sáttmálaparti ríkisins fyri styrkina í sendinevndini, sum fevndi um nógv umboð fyri viðkomandi ráðharrastovur hjá stjórnini og umboð fyri ymsu stjórnarráðini í Føroyum og Grønlandi, sum hava ábyrgdina av, at *Sáttmálin um rættindi teirra, ið bera brek*, verður settur í verk.

## II. Jaligir tættir

4. Nevndin rósar sáttmálaparti ríkisins fyri arbeiðið at endurskoða og broyta lóggávu, serstakliga at lýsa *Kunngerð um sosialar tænastur* nr. 1093 frá 5. septembur 2013, *Kunngerð nr 727 frá 2009 at endurgjalda fólki, ið bera brek, í arbeiði* og lóg nr. 31 frá 2005 um *Forboð ímóti at gera mismun á arbeiðsmarknaðinum*, og broyting í *Miðnámsskúlalógini*, gjørd at integrera fólk við autismu, í 2013. Nevndin rósar føroysku stjórnini fyri at hava samtykt *løgtingslóg um at banna mismuni á arbeiðsmarknaðinum orsakað av breki*, sum kom í gildi í mai 2011.

5. Nevndin rósar eisini sáttmálaparti ríkisins fyri at seta í verk skráir um rættindi hjá fólki, sum bera brek, og virkisætlanina fyri fólk, ið bera sinnislig brek í mai 2014 og fyri at seta meira av til hetta økið.

** Nevndarsamtykt á tólvta fundi (15. sept. - 3. okt. 2014)*

6. Nevndin rósar sáttmálaparti ríkisins fyri úrslit. Hon fegnast um, at danskt teknmál er viðurkent sum eitt alment mál, sum er eitt týðandi stig ímóti fullari viðurkenning av rættindum hjá fólkum, ið bera brek í sáttmálaparti ríkisins. Nevndin hevur eisini varnast, at sáttmálapartur ríkisins hevur stovnað samskipanareind - eina millumráðstovunevnd - sum hevur fingið tann arbeiðssetning at seta sáttmálan í verk innan fyri ávísar geirar undir samskipandi myndugleikanum hjá Ráðharrastovuni fyri børn, kynsjavnstøðu, integrasjón og sosialmál. Nevndin rósar eisini sáttmálaparti ríkisins fyri sín fyrimyndarliga leikpart í altjóða menningarhjálp og fyri at flætta ein politikk fyri tey, sum bera brek, inní. Nevndin rósar Grønlendska landsstýrinum fyri at vera farið undir at stovna ein landsmiðdepil fyri tey, ið bera brek, í Sissimiut í Grønlandi.

7. Nevndin fagnar sáttmálaparti ríkisins, at hann hevur fingið atgongd til sjálvbodnu protkollina til Sáttmálan um rættindi hjá fólki, ið bera brek, við Grønlandi sum landafrøðiligum undantaki tann 23. spetembur 2014

## III. Høvuðsmálsøki og tilmæli

### A. Almennar aðalreglur og skyldur (greinir 1-4)

8. Nevndin harmast, at virkisætlanin frá 2013 fyri fólk, ið bera brek, ikki í síni breidd fevnir um øll rættindi og týðandi sáttmálaøki, og at hon framvegis er rættiliga alment orðað.

9. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins endurskoðar *Landsins virkisætlan fyri tey, ið bera brek* til tess at tryggja, at hon fevnir um øll rættindi og týðandi øki, sum sáttmálin fevnir um, og at sáttmálaparturin setir sær ítøkilig mál, ið kunnu mátast, fær nóg stóra fígging og mátarar, so til ber at máta framgongd, tá ið politikkur, sum víkir at teimum, ið bera brek, verður settur í verk.**

10. Nevndin harmast um, at eingin virkisætlan er fyri fólk, ið bera brek, í Føroyum og Grønlandi og serstakliga, at eingin stuðul er til felagsskapir við fólkum, ið bera brek í Grønlandi, sum ger tey før fyri at vera við til seta sáttmálan í verk.

11. **Nevndin mælir føroyska og grønlendska landsstýrinum til seta í verk munagóðar virkisætlanir fyri politikk fyri tey, ið bera brek, so sáttmálin veruliga fæst at virka. Hon mælir eisini til, at grønlendska landsstýrið stuðlar arbeiðinum hjá felagsskapum við fólki, ið bera brek, at tryggja, at tey so tað munar eru við í ráðgeving og til at fáa sáttmálan at virka.**

12. Nevndin harmast um, at sáttmálin ikki er greidliga flættaður inn í lóggávu í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Hon harmast eisini um tað ikki nóg góðu kunningina um, hvussu

dómstólar og myndugleikar hjá sáttmálaparti ríkisins brúka sáttmálan. Nevndin hevur varnast, at embætisfók hjá ríkinum, økjum og kommunum eru ikki nóg greið yvir sínar skyldur at fáa sattmálan settan í verk.

13. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tryggjar, at sáttmálin verður settur inn í og tikin í nýtslu sum lóg í Danmark, Føroyum og Grønlandi. Nevndin mælir eisini til, at sáttmálapartur ríkisins tekur stig til at lætta um hjá dómstólum og myndugleikum at nýta sáttmálan og at farið verður undir útbúgving til at lætta um hjá embætisfólki hjá landinum, økis- og kommunalum myndugleikum í øllum pørtum av Kongsríki Danmarkar at nýta sáttmálan og seta hann í verk og eisini at geva kommununum vegleiðing í, hvussu ymsu greinirnar um sosiala tænastu virka, tá ið sáttmálaásetingarnar verða fylgdar.**

## B. Serlig rættindi (grein 5-30)

### Javnstøða og ikki-mismunur (grein 5)

14. Nevndini er greitt, at anti-diskriminatsjóneindin hjá stjórnini er stovnað. Hon hevur heimild at hava eftirlit við og fyribyrgja, at mismunur verður gjørdur á fólki, ið bera brek. Kortini harmast hon um, at sáttmálaparti ríkisins vantar víðfevnda móti-mismunar lóggávu, sum hevði kunnað vart fyri mismuni grundað á brek á arbeiðsmarknaðinum. Nevndin harmast eisini um, at lógaramboð vanta fyri fólk, ið bera brek, og hvørs rættindi sambært sáttmálanum eru brotin, og at kunningartilfar ikki er tøkt um tað.

15. **Nevndin skundar undir stjórnirnar í Danmark, Føroyum og Grønlandi at seta í verk nýggjar víðfevndar tvør-geira lóggávu ímóti diskriminasjón, sum víðkar verjuna út um arbeiðsmarknaðin, og hon stendur fast við, at tað at sýta rímiligar tillagingar er diskriminasjón grundað á vanføri. Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur stig til at tryggja, at rímiligar tillagingar verða útvegaðir á øllum økjum samfelagsins uttan undantak; at hann tryggjar fólki, ið bera brek, munadygg lógaramboð, sum eisini fevna um møguleikan at senda inn kærur í sambandi við diskriminasjón grundað á brek til Javnrættindanevndina (Board of Equal Treatment); og at virkað verður fyri, at rættindahavar geva sáttmálanum størri ans.**

16. Nevndin harmast um vantandi sundurgreinaðar dátur um marg- og millumgeira diskriminasjón, og um tey ófullfíggjaðu tiltøkini, sum viðgera diskriminasjón millum geirar - til dømis brek og kyn ella brek og etniskan uppruna - sum skulu mennast meira.

17. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins savnar og breiðir út sundurgreinaðar dátur um mál um marg- og millumgeira diskriminasjón, og at hann setur í verk munadygg og serlig átøk at fyribyrgja marg- og millumgeira diskriminasjón, eisini at loyva kærum um diskriminasjón av fleiri enn einari grund, at fáa í lag hægri endurgjald til offur og at revsa gerningsmenn við hægri gjaldi.**

**Konufólk, ið bera brek (grein 6)**

18. Nevndin harmast um, at *lógin um kynsjavnstøðu* ikki serstakliga vendir sær til kvinnur og gentur, sum bera brek. Nevndin harmast eisini um, at sáttmálapartur ríkisins ikki er farin undir nøkur heilt ávís atøk, sum virka fyri kvinnum og gentum, sum bera brek, í útbúgvingarskipanini, heldur ikki eru nøkur ávís tiltøk at hjálpa kvinnum, sum bera brek, at finna arbeiði ella halda fram við arbeiði.

19. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tryggjar, at hvarvið við kyni og breki er fevnt av lógum og politikki og tænastum í geirunum, og at tað verður sett í verk og eftirmett. Nevndin mælir eisini til, at sáttmálapartur ríkisins tekur stig til at skapa fleiri møguleikar fyri nóg góðari útbúgving og arbeiði til kvinnur og gentur, sum bera brek.**

**Børn, ið bera brek (grein 7)**

20. Nevndin harmast um, at sambært Barnaráðnum (National Council for Children), kunnu børn, ið løgd eru inn á sálarsjúkuhús, fáa tvingaða viðgerð.

21. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur burtur tvingaða innlegging og viðgerð av børnum á sálarsjúkuhúsum og útvegar nóg góðar møguleikar at fáa kunning og ráðgeving, sum tryggjar øllum børnum, ið bera brek, at tey kunnu fáa tann stuðul, teimum tørvar, so tey fáa sagt frá sínum hugsanum.**

**At økja tilvitskuna (grein 8)**

22. Nevndin harmast um frágreiðingar um vanligar fordómar ímillum fólk sum heild viðvíkjandi ymsum brekum, sum gera, at fólk, sum bera brek, ikki hava somu rættindi, eisini tá ið ræður um størv.

23. **Nevndin eggjar sáttmálaparti ríkisins til at hugsa um og seta í verk eina virkisætlan við ítøkiligum málum, ið kunnu verða máld, í samráði við felagsskapir við fólki, sum bera brek, at hækka tilvitskuna í øllum samfelagnum - millum vanliga fólkið, í stjórnum og teimum privatu geirunum, og millum fólk, sum sjálv bera brek - til at mana fram eina góða mynd av fólkum, sum bera brek, og breiða kunnleika um teirra rættindi.**

24. Nevndin hevur varnast og harmast um avmarkaðu kunningina um innihaldið í sáttmálanum og tilvitskustigið um tað ímillum embætisfólk og privatar aktørar, sum eisini fevnir um hugtakið um rímiliga tillaging og mismun, ið grundaður er í breki.

25. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins fer undir ymisk átøk og ymiska útbúgving í samstarvi við felagsskapir hjá fólki, ið bera brek, fyri embætisfólki og privatum aktørum fyri at læra tey meira um rættindi og skyldur, sum standa í sáttmálanum, serliga við atliti at rímiligum tillagingum, og at øll hesi tiltøk verða eftirmett.**

**Atkoma/ atgongd (grein 9)**

26. Nevndin harmast um, at umfatandi tiltøk ikki eru gjørd, ið kunnu tryggja fólkum, ið bera brek, atgongd á jøvnum føti við onnur fólk til fysiskt umhvørvi, til flutning, til kunning og samskifti, og til aðrar hentleikar og tænastur, sum eru opin fyri ella gjørd til almenningin, bæði í bý og á bygd. Nevndin hevur varnast og harmast um, hvussu byggisamtyktir ikki verða fylgdar, og hvussu avmarkað atgongdin er til flutning. Nevndin er eisini varug við og harmast um, at kunning á almennum vevsíðum ikki kemur út í sniði, sum er øllum algongt.

27. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins fer undir víðfevnda ætlan at tryggja fólki, ið bera brek, atgongd til hentleikar, kunning og samskifti, sum eiga at fevna um ítøkilig mál, tíðarkarmar, fíggjarætlanir, revsitiltøk og eftirmeting, sum tað er útgreinað í nevndarinnar almennu viðmerking nr. 2 um atgongd. Í hesum viðfeingi mælir nevndin sáttmálaparti ríkisins til: (a) at skipa fyri áhaldandi útbúgving í altjóða standardi fyri sniðgávu og atgongd, sum eisini fatar um byggisamtyktir, fyri viðkomandi yrkiserskøn, og miðvíst seta í verk revsitiltøk ímóti teimum, sum ikki seta fyriskrivað krøv um atgongd í verk; (b) at tryggja, at privat feløg, sum bjóða fram almennan flutning og aðrar tænastur, halda krøvini um atgongd; og (c) at seta í verk dagføringar um talgilda atgongd og atgongd til kunningartøkni og samskifti og leggja meira ábyrgd á almennar stovnar at kunna og samskifta á heimasíðunum í atkomiligum sniði í samsvari við altjóða fyrisett mát.**

28. Nevndin harmast um, at sjónvarpssendingarnar hjá almenna Kringvarpi Føroya bara fáa undirtekst og/ella verða týddar til teknmál, um tær verða hildnar at hava "stóran áhuga og týdning í samfelagnum."

29. **Nevndin krevur, at Føroya landsstýri tryggjar bæði deyvum fólki og teimum, ið hava ringa hoyrn, atgongd til allar sendingar, ið KvF sendir.**

**Vandar og neyðstøður (grein 11)**

30. Nevndin harmast um vantandi kunning frá sáttmálaparti ríkisins um, hvussu fólk, ið bera brek, og teirra felagsskapir verða tikin við upp á ráð, tá ið Virksiskrá fyri danskt humanitert virksemi (Strategy for Danish Humanitarian Action) 2010-2015 varð gjørd, sett í verk og eftirmett, og um at serligar fráboðanarskipanir ella reglur ikki eru at veita fólkum, ið bera brek, neyðuga stuðulin og verjuna, skuldi vandi ella neyðstøða tikið seg upp.

31. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur stig at tryggja, at minking í vanlukkuváða fult og heilt fevnir um øll, sum bera brek, at menna og seta í verk atkomiligar fráboðanarskipanir ella reglur, og at skipa fyri venjing við bjargingar- og neyðsynjarmanning so fólk, ið bera brek, fáa neyðuga stuðilin og verjuna, skuldi vandi ella neyðstøða tikið seg upp.**

## Javnbjóðis viðurkenning fyri lógini (grein 12)

32. Nevndin hevur varnast, at Lóg um verjumál (Legal Incapacity and Guardianship Act) framvegis loyvir øðrum støðutakanum, sum á tann hátt venja einstaklingin til ikki at brúka síni rættindi, til dømis rættin at atkvøða, at brúka rættarskipanina og fáa heilsuviðgerð játtaða.

33. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins endurskoðar lógina um verjumál og setur inn í lógina stuðlaðar avgerðir, sum virða rættindi, vilja og hug hjá einstaklingi, fullkomiliga í samsvari við grein 12 í sáttmálanum, sum viðger rættin hjá einstaklingi at taka undir við heilsuviðgerð og at taka samtykki aftur, at hava atgongd til rættarskipanina, at fara á val, at giftast og at arbeiða.**

## Frælsi og trygd hjá einstaklingi (grein 14)

34. Nevndin harmast um munin, ið sáttmálapartur ríkisins ger ímillum revsing og viðgerð. Eftir muninum verða einstaklingar, sum verða hildnir at vera "óskikkaðir at koma fyri rættin" vegna brek, ikki revsaðir, men dømdir til viðgerð. Viðgerð er ein samfelagslig eftirlitsrevsing og í staðin skuldi komið formlig brotsrevsing fyri lógbrótarar, sum avgjørt hava verið uppi í brotsgerð. Tann mannagongd, ið nýtt verður at gera av, um einstaklingur skal verða dømdur til viðgerðar er ikki í samsvari við ta trygd, sum ein revsirættarlig mannagongd skuldi havt, skuldi tað komið til revsing, sum einstaklingur skuldi fingið. At døma einstakling til viðgerð er tí ikki í samsvari við grein 14.

35. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins fer undir at endurskoða bygnaðin í mannagongdum, sum nýttar verða at revsa einstaklingar, sum bera brek, tá ið teir hava framt brotsverk. Skipanin eigur at samsvara við almenna trygd og ábyrgd, sum er fyri øll fólk, sum skuldsett eru fyri brotsverk í eini revsirættarskipan, millum annað, grunsul um sakloysi, rætt til verju og til reiðiliga dómsviðgerð.**

36. Nevndin harmast um, at Psykiatrilógin loyvir tvingaða innlegging ella viðgerð á sjúkradeild fyri fólk, sum hava sinnisligan heilsuskaða, ímóti vilja teirra, um tey verða hildin at vera til bága fyri seg sjálv ella onnur, sum kann merkja tað sama sum at taka frælsi og trygd frá einum grundað á brek. Tað gongur ímóti grein 14 í sáttmálanum.

37. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur øll neyðug stig til at endurskoða Psykiatrilógina fyri at tryggja, at fólk, ið bera brek, hava sama rætt til frælsi og trygd sum onnur. Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tryggjar, at eingin verður hildin inni á nakrari deild grundað á veruligt ella grunað brek.**

**At sleppa undan pínslu ella óndari, ómenniskjaligari ella niðrandi viðgerð ella revsing (grein 15)**

38. Nevndin harmast stórliga, hvussu nógvar tvingsilsviðgerðirnar av fólki eru, sum løgd verða inn á sinnissjúkrastovnar og um arbeiðshátt, brúktur í tvingaðari og ósjálvbodnari viðgerð av fólkum, ið bera brek á sinnisjúkrastovnum, serliga at stroppar og belti verða nýtt í meira enn 48 tímar, at kemisk tálmingarevni verða nýtt, og hvussu ofta ósjálvboðin elektroskelkviðgerð verður nýtt sambært frágreiðingum.

39. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins broytir lógir og reglugerðir til tess at banna at brúka kropslig, kemisk og onnur læknalig tiltøk, sum semja ikki er um, til fólk við psykososialum breki á stovnum. Serliga mælir hon til, at sáttmálapartur ríkisins gevur læknum og starvsfólki á røktarstovnum og øðrum líknandi stovnum útbúgving í samsvari við sáttmálan til tess at fyribyrgja pínslu og óndari, ómenniskjaligari og niðrandi viðgerð ella revsing.**

**Frælsi frá eyðræning, harðskapi og misnýtslu (grein 16)**

40. Nevndin harmast um frágreiðingar, sum vísa, hvussu nógvari misnýtslu, eyðræning og harðskapi, eisini harðskapi við hús, sum fólk, ið bera brek, kunnu vera fyri, og hvussu fá herbergi eru tøk hjá fólki, sum eru fyri slíkum ágangi, og eisini ta vantandi útbúgving, sum løgregla og aðrir samrøðupartar hava. Nevndin harmast eisini tørvin á sundurgreinaðum dátum um fráboðanir um misýtslu, eyðræning og harðskap ímóti fólki, ið bera brek, og um avleiðingarnar av teimum.

41. **Nevndin mælir til, at danska stjórnin, landsstýrið í Føroyum og Grønlandi tryggja, at harðskapur og misbrúk ímóti øllum fólkum, ið bera brek, verða fráboðað og væl kannað; at neyðugi stuðulin til offur er tøkur, t.d. beinleiðs ráðgeving umvegis telefon ella teldupost, herbergi, tænastur og kærumøguleikar; og at evnið verður tikið upp á útbúgvingarskeiðum um alt landið fyri starvsfólk, sum arbeiða í heilsuverkinum, skúlum, í løgregluni og í dómskervinum. Nevndin mælir eisini til, at stjórnirnar savna sundurgreinaðar dátur og hagtøl um frágreiðingar um misnýtslu, eyðræning og harðskap frá fólki, ið bera brek, og avleiðingarnar av tí.**

**At liva sjálvstøðugt og at sleppa upp í part í samfelagnum (grein 19)**

42. Nevndin harmast um vaksandi byggingina, sum kommunur standa fyri við statsgaranteraðum lánum, av stórum stovnslíknandi bústøðum til fólk, ið bera brek, við tríati til seksti ella enntá fleiri búfólkum, ofta uttan fyri býarmiðdeplar. Eisini harmast hon um seinastu yvirlitini, sum benda á skerdu møguleikarnar hjá fólki, ið bera brek, fræls at kunna velja, hvar tey vilja búgva, og eisini dømi um tvingsilsflyting.

43. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins gevast við statsgaranteraðum lánum til at byggja stovnlíknandi bústaðir til fólk, ið bera brek; at lóggávan um sosialar tænastur verður broytt soleiðis, at fólk, ið bera brek, sjálv kunnu velja hvar og saman við hvørjum,**

**tey vilja búgva, og at tey fáa neyðugu hjálpina at liva sjálvbjargin; og at stig verða tikin at lata teir stovnslíknandi bústaðirnar, ið eru, aftur og forða fyri, at fólk, ið bera brek, verða tvingað at flyta, so tey sleppa undan at verða avbyrgd frá samfelagnum.**

**Tali- og áskoðanarfrælsi og atgongd til kunning (grein 21)**

44. Nevndin harmast um, at summi deyv fólk, serliga børn, ið fødd eru deyv og hava fingið ísett cochlear implantat, verða forðað í at læra og samskifta á donskum teknmáli. Eisini harmast nevndin um, at nýggjasta broytingin í lógini um danska málráðið talar ikki fyri at styrkja danskt teknmál við gransking og útbúgving.

45. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins viðurkennir rættin hjá øllum deyvum fólkum og teimum, ið fødd eru deyv, at hava møguleikan at læra og samskifta á donskum teknmáli, sama hvør læknalig viðgerð er gjørd; taka munadygg stig at styrkja danskt teknmál sum samskiftishátt uttan at verða noydd at fara undir taluterapi; at granskað verður í donskum teknmáli, og at skrivað verður ein donsk teknmálsorðabók; og at stimbra nýtsluna av donskum teknmáli í øllum lívsins viðurskiftum hjá deyvum til tess at tryggja, at tey sleppa upp í part serliga í sambandi við størv, útbúgving og mentanarlív. Eisini mælir nevndin til, at Føroya landsstýri viðurkennir føroyskt teknmál sum eitt alment mál.**

46. Nevndin viðurkennir, at Braille er týdningarmikið samskiftisamboð hjá blindum í útbúgving og starvi. Nevndin harmast kortini, at allir blindir næmingar ikki verða lærdir Braille, av tí at teir eru fáir og búgva spjaddir. Nevndin harmast eisini, at miðfirraði bygnaðurin og ábyrgdin hjá kommunum ikki er tað rætta at varðveita slíkt spesialiserað tól, og at sáttmálapartur ríkisins skilir vandan við, at kunnleiki í útbúgving við serstuðli kann versna, sum bent varð á í samrøðuni.

47. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins stovnar eitt Braille-ráð við tí setningi, at stimbra, varðveita og økja kunnleika til og nýtslu av Braille sum samskiftisamboði fyri blind, eisini í útbúgving.**

48. Nevndin harmast um, at sáttmálapartur ríkisins ikki tryggjar, so tað munar, at kunning kemur út til fólk, sum intellektuelt og mentalt bera brek, í atkomiligum, alternativum og vaksandi samskiftisháttum og sniðum.

49. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins á sama hátt viðurkennir at menna og fáa fram bøtandi og alternativar samskiftishættir, sum fólk, sum intellektuelt og mentalt bera brek, sleppa framat. Sáttmálapartur ríkisins eigur at taka hóskandi stig at tryggja, at allir partar kenna ásettan standard fyri at brúka bøtandi og alternativar samskiftishættir og eigur at seta upp dyggar eftirlitsmannagongdir, sum forða fyri eftirgjørdari kunning og samskifti, serliga, tá ið støða verður tikin viðvíkjandi fólki, sum intellektuelt og mentalt bera brek**

**Virðing fyri privatlívi (grein 22)**

50. Nevndin harmast um, at á psykiatriskum sjúkrahúsum er loyvt, undir Psykiatrilógini, at flyta upplýsingar, ið eru fullkomiliga privatar og í trúnaði, til triðjapart uttan samtykki frá tí fólkinum, tað viðvíkur.

51. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins broytir psykiatrilógina soleiðis, at bannað verður at flyta sjúklingaupplýsingar, ið eru privatar og givnar psykiatriskum sjúkrahúsum í trúnaði til triðjapart uttan samtykki frá fólkinum, tað viðvíkur, til tess at virkað verður eftir aðalregluni um virðing fyri privatlívi.**

**Útbúgving (grein 24)**

52. Nevndin er varug við ein stjórnarreform, sum virkar fyri at inkludera børn, ið bera brek, í almennu útbúgvingarskipanini, men harmast kortini um, at ikki er nóg greitt, hvussu nógvan stuðul børn, ið bera brek, kunnu fáa og tillagingar at lætta um teirra útbúgving, og eisini minka um munin á avriksstigi millum børn við ongum breki og teimum, ið bera brek bæði í barnaskúla, miðnámi og hægri útbúgving.

53. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins broytir lóggávuna til tess at tryggja, at øll børn, ið bera brek, verða tikin inn í høvuðsútbúgvingarkervið við hóskandi stuðli og tillaging, serliga við at útvega hóskandi útbúgving til lærarar og aðrar arbeiðsgevarar í skúlaskipanini í øllum pørtum av danska kongsríkinum til tess at tryggja dygdargóða útbúgving til næmingar, ið bera brek. Sáttmálapartur ríkisins eigur at taka stig at viðgera munirnar í avriksstigi millum børn við ongum breki og teimum, ið bera brek, á øllum útbúgvingarstigum**.

54. Nevndin harmast um frágreiðingar um, at børn, sum hava tørv á meiri enn 9 tímum við serundirvísing um vikuna, kunnu senda inn klagu til nevndina fyri serundirvísing, men ikki børn, sum hava tørv á minni enn 9 tímum av serundirvísing um vikuna. Tey kunnu ikki senda inn klagu til óheftan myndugleika um tørv á hóskandi undirvísingarstuðli.

55. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins broytir lóggávuna til tess at tryggja, at øll børn, ið bera brek, kunnu senda inn klagu til óheftan myndugleika, fáa tey ikki nóg góðan undirvísingarstuðul.**

**Heilsa (grein 25)**

56. Nevndin harmast um upplýsingar, sum benda á, at fólk, ið bera sinnislig brek, hava mettan livialdur, sum er 15-20 ár styttri enn tann hjá fólki við ongum sinnisligum breki.

57. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tryggjar, at fólk, ið bera brek, serliga fólk, sum bera sálarlig brek, hava javnbjóðis øðrum atgongd til hægsta heilsustig, ið fæst, eisini við at veita nóg góða og atkomiliga heilsutænastu, sum fólk, ið bera brek, hava tørv**

**á, og við at útbúgva heilsustarvsfólk og embætisfólk í almenna heilsugeiranum og eisini rættin til frítt og upplýst samtykki.**

**Arbeiði og starv (grein 27)**

58. Nevndin harmast um, at tó at lógin um forboð um mismun á arbeiðsmarknaðinum forbjóðar beinleiðis og óbeinleiðis ymiskari viðferð grundað á brek, so áseta hvørki tann almenna lóggávan ella arbeiðssemjurnar greið krøv til arbeiðsgevarar at útvega rímiligar tillagingar á arbeiðsmarknaðinum, sum kann vera ein av keldunum til ta arbeiðsglopp ímillum fólk, ið bera brek (44 prosent av teimum arbeiða) og fólk, ið ikki bera brek (78 prosent av teimum arbeiða).

59. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur øll neyðug stig til at økja nógv og skjótast til ber prosentið av fólki, ið bera brek, sum virka á opna arbeiðsmarknaðinum, eisini broyting í almennu arbeiðslóggávuni, soleiðis at hon setur arbeiðsgevarum greið krøv at veita starvsfólki, sum bera brek, rímiligar tillagingar.**

**Luttøka í politiskum og almennum lívi (grein 29)**

60. Nevndin harmast um, at í grundlógini, vallóg tingsins, øðrum vallógum og verndarlógini (grein 6) hava fólk undir vernd ikki loyvi at atkvøða ella at standa fyri vali til tingið, kommunur, vali til økisting, Evropatingið ella fólkaatkvøðu. Nevndin harmast eisini um, at valtilfar sjaldan er tøkt hjá blindum ella hjá fólki, ið bera lærubrek og intellektuell brek, at valstøð mangan ikki eru atkomilig, at atkvøðuseðlar ikki eru til blind fólk, og at fólk undir vernd ikki fræls kunnu velja ta valhjálp, tey kundu hugsað sær

61. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins broytir viðkomandi lógir, eisini lógina um val til tingið og aðrar lógir, ið skipa kommunuval, økisval og val til Evropatingið soleiðis, at øll fólk, ið bera brek, hava rætt at atkvøða og standa fyri vali uttan mun til verju ella aðrar skipanir. Nevndin mælir eisini til, at sáttmálapartur ríkisins tryggjar við lógum og øðrum tiltøkum, at atgongd er til atkvøðuseðlar og valtilfar og valstøð, og at tryggjað verður, at frí, holl og neyðug hjálp verður veitt til at lætta um hjá øllum at atkvøða.**

**Luttøka í mentanarlívi, stuttleika, frítíð og ítrótti (grein 30)**

62. Nevndin harmast um, at sáttmálapartur ríkisins ikki hevur staðfest Marrakesh sáttmálan at lætta um atgongdina til almannakunngjørd verk til fólk, sum eru blind, hava skerda sjón, ella á annan hátt er skerd í sambandi við prent, sum gevur atgongd til prentað tilfar til blind, fólk við skerdari sjón ella fólk, sum á annan hátt hava ilt við at ogna sær innihaldið í prentaðum tilfari.

63. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins tekur øll hóskandi stig til at staðfesta og seta í verk Marrakesh sáttmálan skjótast til ber.**

## C. Serligar skyldur (grein 31-33)

### Hagtals- og dátuinnsavning (grein 31)

64. Nevndin hevur givið arbeiðinum gætur at savnað eru hagtøl um fólk, ið bera brek í Danmark, eisini KT-grundaðar dátur um hjálp og veitingar til fólk, ið bera brek, í Grønlandi, og at almenn dátuinnsavning er í Føroyum, men nevndin harmast, hvussu lítið av dátum eru sundurgreinaðar um fólk, ið bera brek.

65. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins skipar innsavning, greining og útbreiðslu av dátum, sundurgreinað eftir kyni, aldri, breki og øki; at menna førleika til hetta; gera mátarar, ið máta kyn og aldur og leggja dentin á tørvin at skifta frá einum heilsugrundaðum hugburði til brek til ein, ið hevur støði í mannarættindum.**

### Verkseting og eftirlit um alt landið (grein 33)

66. Nevndin hevur givið arbeiðinum hjá millumráðharrastovunevndini hjá sáttmálaparti rikisins ans, men harmast, at henda nevnd bara av og á leitar sær íkast frá felagsskapum við fólkum, ið bera brek í Danmark, og at samskipan við umboðandi persónsfelagsskapir í Føroyum og Grønlandi manglar. Nevndin harmast eisini um at samskipan ikki er og einki sjálvstøðugt eftirlit er í Føroyum.

67. **Nevndin mælir til, at sáttmálapartur ríkisins fær í lag borgarafelag, serliga umboðandi felagsskapir fyri fólk, ið bera brek, á fullgóðan hátt og regluliga at hava eftirlit við, at sáttmálin verður hildin. Sáttmálapartur ríkisins eigur eisini at taka neyðug stig til at stovna og skipa eina samskipanareind og sjálvstøðuga eftirlitsskipan í Føroyum. Nevndin mælir eisini til, at føroyska landsstýrið stovnar ein mannarættindastovn at fremja og verja mannarættindi í samsvari við París aðalreglurnar.**

### Málsframhald og útbreiðsla

68. Nevndin krevur, at sáttmálapartur ríkisins innan fyri 12 mánaðir og í samsvari við grein 35, stykki 2 í sáttmálanum, upplýsir um stig, sum tikin eru at seta í verk tilmæli nevndarinnar, soleiðis sum tey eru sett upp í grein 21, sum viðvíkur tvingaðari innlegging á sjúkrahús og viðgerð av børnum á psykiatriskum deildum.

69. Nevndin krevur av sáttmálaparti ríkisins at sett verða í verk nevndartilmælini, sum tey standa í hesum endaligu viðmerkingum. Hon mælir til, at sáttmálapartur ríkisins sendir endaligu viðmerkingarnar til umrøðu og til at virka eftir hjá stjórn og tingi, embætisfólki í viðkomandi ráðharrastovum, lokalmyndugleikum og limum í viðkomandi yrkisbólkum sum útbúgvingar-, heilsu- og lógarserkønum og fjølmiðlum, við at brúka nútíðar sosialar samskiftishættir.

70. Nevndin eggjar sáttmálaparti ríkisins staðiliga til at taka borgarafelagsskapir uppí, serliga felagsskapir við fólkum, ið bera brek, tá ið regluligu frágreiðingarnar verða fyrireikaðar.

71. Nevndin krevur, at sáttmálapartur ríkisins breiðir út hesar endaligu viðmerkingar víða, eisini til ikki-stjórnarligar felagsskapir og umboðandi felagsskapir við fólki, ið bera brek, eins og til fólk, sum sjálv bera brek, og familjulimir teirra, á tjóðarmáli og minnilutamálum, eisini teknmáli og í atgongdum sniði, og at gera tær tøkar á landsstýrisins heimasíðu um mannarættindi.

**Næsta frágreiðing**

72. Nevndin biður sáttmálapart ríkisins senda inn eina samansetta aðru og triðju regluligu frágreiðing í seinasta lagi 24. august 2019, og at seta upplýsingar inn um at seta endaligu viðmerkingarnar í verk. Nevndin biður sáttmálapart ríkisins hugsa um at senda inn omanfyri nevndu frágreiðing til nevndina undir einfaldaðu mannagongdini til frágreiðingar. Eftir tí fyrireikar nevndin ein lista við málum í hvussu er eitt ár fyri ásetta dag fyri at lata inn samansettar frágreiðingar hjá sáttmálaparti ríkisins. Svarini frá sáttmálaparti ríkisins til slíkan lista við málum mynda næstu frágreiðing.